LANDSVERKFRØÐINGURIN

KT-FÓLK

- verkfrøðingur, dátufrøðingur ella líkn.

Søkt verður eftir einum KT-fólki til stovnin .

Arbeiðsuppgávur
Tann, ið settur verður, fer at taka lut í ymiskum edv-verkætlanum við tí endamáli at menna KT-tøknina á stovninum og verður við í rakstri og viðlíkahaldi av telduútbúnaðinum, ið fevnir um umsitingina av eini HP 9000 teldu, umframt viðlíkahald av pc'arum og ráðgeving, menning og útbúgving av starvsfólki.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir verkfrøðingi, dátufrøðingi ella líknandi. Umsøkjari við kunnleika til Unix, Windows, C og Oracle hevur fyrimun.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. februar2002. Merkið brævbjálvan "KT-fólk".

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Torkil Zachariassen á tlf.311333
(e-postur: torkil@lv.fo).

Kursus i islandsk og islandsk kultur for udlændinge sommeren 2002

Kurserna vänder sig i första hand till besökande nordiska turister

Nybörjarkurs **1–12 juli 2002**

Fortsättningkurs 15–26 juli 2002

Deltagerantal: Max. 14 på varje kurs

Kursavgift: **DKR 3.000**
Deltagarna bekostar resa och uppehåll själv. Nordens hus kan hjälpa till med att arrangera inkvartering.

Anmälan: För den **1. april 2002** på särskild blankett som rekvireras från Nordens hus eller på hemsidan http://www.nordice.is

För närmare information kontakta språkkonsulent **Kristín Jóhannesdóttir**, tel. +354 551 70 30, fax +354 552 6476, e-post: kristinj@nordice.is

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

Um skyldu at geva upp skattskylduga inntøku fyri 2001

Við heimild í § 100, 2. stk. í skattalógini skal Toll- og Skattaráðið við hesum krevja øll, sum skulu verða sett í skatt, um at geva upp skattskyldugu inntøku sína, áðrenn niðanfyri nevndu og ávístu freistir eru úti.

Til persónligar skattgjaldarar

Sjálvuppgávan av inntøkuni fyri 2001 og inntøku av kapitalvinningi hjá persónligum skattgjaldarum, ið ikki hava roknskaparskyldu, skal vera innlatin til Toll og Skattstovu Føroya í seinasta lagi **fríggjadagin 15. mars 2002.**

Um hálvan februar sendir Toll- og Skattstova Føroya sjálvuppgávur út. Sjálvuppgávurnar eru grønar. **Øll, sum móttaka eina sjálvuppgávu, skulu senda hana inn aftur.**

Teir persónar, Toll- og Skattstova Føroya metir seg at hava rættar upplýsingar um, fáa tó eina skattauppgerð, ið er eitt blátt skjal. Hesi fáa onga sjálvuppgávu sendandi.

Eru upplýsingarnar á skattauppgerðin ikki rættar, skal sjálvuppgáva sendast inn.

Sjálvuppgávan fæst á økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya kring landið. Eisini er hon í bóklinginum »Skatturin 2001«.

Framskundað skattauppgerð
Tey, ið ikki hava annan frádrátt enn eftirlønargjald, og ikki hava B-inntøku, kunnu fáa framskundaða skattauppgerð, um tey innan 1. februar 2002 lata sjálvuppgávu inn til Toll og Skattstovuna. Á hesi sjálvuppgávu skal **bert gjaldið til eftirløn** í 2001 verða upplýst og **skjalprógv skal viðleggjast.**

Verða aðrar upplýsingar skrivaðar á sjálvuppgávuna, sum t.d. B-inntøkur og/ella aðrir frádráttir, verður hon at meta sum vanlig sjálvuppgáva, og vil tað siga, at **skattauppgerðin kann ikki roknast við at verða gjørd fyrr enn í fyrsta lagi í mars mánaða.**

Ognaruppgerð
Tað er bert neyðugt at lata inn ognaruppgerð, um broytingar eru í ogn og skuld í mun til 31. desember 2000. Tó skulu tey, sum Toll- og Skattstovan sendir ognaruppgerð til, lata hana innaftur.

Til feløg v.m.

Sjálvuppgávur, roknskapir og inntøkur av kapitalvinningi viðvíkjandi árinum 2001 hjá deyðsbúgvum, feløgum, felagsskapum v.m. við roknskaparskyldu skulu vera **økisskrivstovunum** hjá Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

1. juni 2002,

um roknskaparskeið teirra endar í ella fellur saman við álmannakkaárinum 2001 (smb. § 1, 1. stk. nr. 7-16 og § 2 í skattalógini).

Ber til at leingja freistina?
Tá serlig grund er til tess, kunnu økisskrivstovurnar leingja freistina til 15. august 2002, treytað av at
- umsóknin er skrivlig
- umsóknin er send áðrenn **1. juni 2002**
- sjálvuppgávur og roknskapir fyri eldri ár eru innkomin.

Til privat vinnurekandi

Við heimild § 105, 2. stk. í skattalógini og vísandi til kunngerð nr. 92 frá 19. november 1999 frá Fíggjarmálastýrinum skulu sjálvuppgávur, roknskapir, ognaruppgerðir og inntøkur av kapitalvinningi viðvíkjandi árinum 2001 hjá privatum vinnurekandi við roknskaparskyldu vera **Økisskrivstovunum** hjá Toll- og Skattstovu Føroya í hendi sum tilskilað niðanfyri:

Føðingardagur:	Seinasti innlatingardagur:
1/1 – 28/2	1. apríl 2002
1/3 – 30/4	1. mai 2002
1/5 – 30/6	1. juni 2002
1/7 – 31/8	1. juli 2002
1/9 – 31/12	15. august 2002

Um báðir hjúnafelagarnir hava skyldu at føra roknskap, kunnu báðir lata inn sambært tí freist, sum er galdandi fyri tann hjúnafelagan, sum hevur tann seinna føðingardagin.

Ber til at leingja freistina?
Tá serlig grund er til tess, kunnu økisskrivstovurnar leingja freistina til 15. august 2002, treytað av at
- umsóknin er skrivlig
- umsóknin er send, **áðrenn nevndu innlatingarfreistir eru farnar**
- sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru innkomin

Sjálvuppgávur, ognaruppgerðir og roknskapir eru roknað fyri at vera innlatin rættstundis, tá ið tær/teir í seinasta lagi eru fingin Toll- og Skattstovu Føroya ella eru latin í postin í seinasta lagi omanfyri nevnda innlatingardag. Fellur seinasti innlatingardagurin á ein leygardag, sunnudag ella halgidag, verður seinasti innlatingardagur fyrsta eftirfylgjandi gerandisdag.

Um fullfíggjað sjálvuppgáva yvir inntøku ikki er latin inn rættstundis, eins og frammanfyri er ásett, verður hækking gjørd samsvarandi reglunum í § 104 í skattalógini.

Vitjið eisini heimasíðu stovnsins: www. tollskatt.fo

Argir, tann 15. januar 2002

Toll- og Skattaráð Føroya

Næmingar av Eiði og frá Norðskála í starvsvenjing Tórshavn

Heini Niclasen av Eiði, sum gongur á Felagsskúlanum á Oyrarbakka, er í starvsvenjing á Sosialinum. Hann hevur verið í býnum í Havn og tosað við floksfelagar, sum eisini eru í starvsvenjing í høvuðsstaðnum

STARVSVENJING
Heini Niclasen

Nú eri eg sjálvur í praktik hjá Sosialinum, og eg fekk so ta uppgávu at skriva um nakrar av hinum praktikantunum, í Havnini.

Eg legði fyrst leiðina niðan í SMS, har tríggjar floksfelagar royna seg í hvør sínum handli. Síðani fór eg niðan á Háls, har ein floksfelagi er í praktikk hjá Føroya Tele.

Navn: Judith Jacobsen.
Búðstaður: Eiði

Hvar ert tú í praktik?
Eg eri í praktik í Deres í SMS.

Hví valdi tú at fara í praktik hjá Deres?
Tí at mær dámar klæðini har, og tí at eg helt tað vera spennandi at prøva tað.

Hvussu eru fólkini í Deres at arbeiða saman við?
Tey eru fitt at arbeiða saman við, tí at tey tosa nógv við meg, eru ung og eru lætt at koma í samband við.

Hevði tú eisini valt Deres, um tað var uttan fyri Havnina?
Nei tað hevði eg nokk ikki, tí at eg haldi, at tað hevði verið nokkso rotið at vera í praktik úti á bygd. Tí í Havn kann man fara at bio, bowla og gera mangt annað, sum man ikki kann gera úti á bygd.

Hvat gert tú, táið ert í praktik hjá Deres?
Eg støvsúgvi, pussi vindeygu og leggi klæðir saman og standi eisini onkuntíð við diskin.

Ætlar tú at arbeiða í einum klædnahandli, tá ið tú verður vaksin?
Nei, tað er ikki planurin. Eg ætli mær at vera frisør.

Hví valdi tú so ikki at fara í praktik hjá einum frisøri?
Tí eg vildi prøva okkurt annað, áðrenn eg fari at vera frisør.

Navn: Durita Kallsoy.
Búðstaður: Eiði

Hvar ert tú í praktik?
Eg eri í Veromoda í SMS

Hví valdi tú at fara í praktik hjá Veromoda?
Tí at mær dámar klæðini har.

Hvussu eru fólkini í Veromoda at arbeiða saman við?
Tey eru fitt at arbeiða saman við, men eg hevði vilja at tær høvdu tosa meira við meg.

Hevði tú eisini valt Veromoda um tað hevði verið uttanfyri havnina?
Nei tað rokni eg ikki við, tí at her er meira at gera enn úti á bygd, og tí at eg sjálv búgvi úti á bygd, og eg vildi gjarna prøva okkurt nýtt, t.d. arbeiða í einum klædnahandli í Havn.

Hvat gert tú, táið tú ert í praktik á Veromoda?
Eg leggi klæðir saman og standi eisini við diskin og geri eisini nógv annað

Ætlar tú tær at arbeiða í einum klædnahandli táið tú verður vaksin?
Nei tað ætli eg ikki, tí at eg ætli mær at vera frisør.

Hví valdi tú so ikki at fara í praktik hjá einum frisøri?
Tí eg vil gjarna læra tað, áðrenn eg fari at klippa har, og eisini tí eg havi hoyrt, at man sleppur einki at gera, táið man er í praktik hjá einum frisøri, bara sópa gólv og vaska hár.

Navn: Jógvan Páll Kristiansen
Búðstaður: Norðurskáli

Hvar ert tú í praktik?
Hjá Føroya Tele.

Hví valdi tú at fara í praktik hjá Føroya Tele?
Tí at øll, sum hava verið her fyrr siga, at tað er sera spennandi.

Hvussu eru fólkini at arbeiða saman við?
Øgiliga fitt og hjálpsom.

Hvat gert tú, táið tú ert í praktik hjá Føroya Tele?
Eg umvali telefonir og tílíkt.

Hevði tú valt Føroya Tele, hevði tú skula út á bygd?
Nei tað hevði eg ikki, tí at næstan øll hini í flokkinum eru farin til Havnar, men eg skal bara vera í Havn í eina viku, og so skal eg eisini til Runavíkar eina viku, men tað tími eg ikki.

Ætlar tú at arbeiða á Føroya Tele, tá í tú gerst vaksin?
Ja, tí at mær dámar sera væl at skrúva elektrisk ting sundur og saman, so tað rokni eg næstan við at eg fari at gera.

Navn: Brynleif Andreasen
Búðstaður: Eiði

Hvar ert tú í praktik?
Eg eri í praktik hjá Elding í SMS.

Hví valdi tú at fara í praktik hjá Elding?
Tí eg visti ikki, hvar eg skuldi fara, og so kom ein lærari við hugskotinum.

Hvussu eru fólkini í Elding at arbeiða saman við?
Tey eru sera fitt, tí tey hjálpa mær, tá ið tað er okkurt og eru eisini sera fitt at tosa við.

Hvat gert tú, tá tú ert í praktik hjá Elding?
Eg standi við diskin, seti vørur á plass, seti prísir á vørurnar og eg koyri eisini vørur út.

Hevði tú eisini valt at farið í praktik í Elding, hevði tað ligið uttan fyri Havnina?
Ja, tað hevði eg nokk, tað hevði bara ikki skula verið uttan fyri Eystur- og Streymoynna.

Ætlar tú at arbeiða við tílíkum, tá ið tú gerst vaksin?
Og her svarar hann so: »Kanska og kanska ikki«

Stórur brúktbilamarknaður MOTORS

Mazda 323 S 1,3i LX Blár, 4 hurðar, 5 gear, Km.104.000, árg. 87	28.000,-
Mazda 323 S 1,5i LX Blár, 4 hurðar, 5 gear, Km. 39.000, árg. 06/97	97.000,-
Mazda 626 HB 2,0i GLX Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 149.000, árg. 01/99	159.000,-
Fiat Multipla 1,8 Grátur, 5 hurðar, 5 gear, árg. 01/00	156.000,-
KIA Carnival 7 pers. Diesel Aut Beige, 5 hurðar, 5 gear, Km. 40.000, árg. 99	140.000,-
Ford Escort 1,8 Diesel Sedan Blár, 4 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 04/00 Km. 126.000, árg. 08/95	66.000,-
Ford Escort 1,8 Diesel St.car Grátur, 5 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 04/01 Km. 85.000, árg. 06/98	98.000,-
Ford Escort 1,8 Turbo Diesel St.car Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 03/00 Km. 44.000, árg. 08/97	130.000,-
Ford Escort St.car 1,6 Zetec Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 33.000, árg. 08/99	124.000,-
Ford Focus StCar 1,8 Diesel Grátur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 13.000, árg. 08/00	187.000,-
Ford Mondeo Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 01/00 Km. 80.000, árg. 01/95	85.000,-
Honda Civic S 1,4 IS Hvítur, 4 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 03/00 Km. 78.000, árg. 12/98	112.000,-
Renault Megane 1,4e Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 34.000, árg. 08/98	110.000,-
Renault Megane 1,4e Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 68.000, árg. 04/97	120.000,-
Renault Megane 1,6e Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 08/00 Km. 60.000, árg. 12/96	100.000,-
Renault Megane 1,6e Sedan Beige, 4 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 08/98	120.000,-
Renault Twingo Grønur, 3 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 04/00 Km. 78.000, árg. 11/95	45.000,-
Renault Twingo Reyður, 3 hurðar, 5 gear, Km. 48.000, árg. 04/99	84.000,-
Skoda Felicia Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Sjálvskipt 03/01 Km. 81.000, árg. 09/96	55.000,-
Suzuki Baleno 1,3 GL Plus Grátur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 69.000, árg. 10/96	65.000,-
Toyota Carina Sedan 1,8 CDX Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 10/97	128.000,-
Toyota Corolla 1,6 Hatchback Reyður, 3 hurðar, AUT, Km. 40.000, árg. 07/97	95.000,-
Toyota Corolla 1,6 Luna Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 38.000, árg. 04/98	122.000,-

BERG MOTORS
Vestmannavegur 1-3 Tlf. 31 38 35 Fax 31 77 35

Mazda E2200 PU Stállisat Reyður, 2 hurðar, 5 gear, Km. 32.000, árg. 05/97	78.000,-
Mazda E2200 PanelVan Høgt tak Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 110.000, árg. 06/97	75.000,-
Mazda E2200 PlusCab 4x4 Reyður, 2 hurðar, 5 gear, árg. 10/96	115.000,-

BERG MOTORS
Stannagar 1-3 • Tlf. 31 38 35 • Fax 31 77 35